VINNU SÍÐURNAR

Nr. 164 • mikudagur • 31.august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo



*Leygardagin stevndi einasti rækjubátur, sum nú er í vinnu undir føroyskum flaggi, aftur til fiskiskap*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tann seinasti rækjubáturin:

# Fór nýggjan túr yvir á Grand Bank

RÆKJUVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin loysti einasti rækjubáturin, sum er eftir í vinnu í føroyska rækjuskipaflotanum. Teir fóru nýggjan túr yvir í altjóða sjógv á Grand Bank at royna.

Talan er um rækjubátin, Havborg, sum leirvíkingar eiga.

Reiðaríið vónar, at hesin túrurin ikki verður longur enn ein mánaða ella so.

### Fulla last

Skipið hevur verið á Svalbards-leiðunum og var inni í Tromsø í Noregi herfyri við fullari last. Har bunkraðu teir eisini olju, sum í Noregi er nøkur oyru bíligari fyri literin, enn hon er í Føroyum.

Eini 40 tons av veiðini hjá Havborg hendan túrin var kókaðar rækjur, restin var rárækjur.

Fyri rárækjurnar fáa teir slakar 8 krónur fyri kilo og millum 14 og 16 krónur fyri kilo av kókaðum rækjum.

Hesin túrurin við Svalbard hevur verið einar 5-6 vikur langur, og veiðan liggur millum 350 og 400 tons.

### Fiskar væl – gongur ikki

Tað eru vágsbrøðurnir, Jóhannes og Dan Joensen, sum skiftast um at føra Havborg.

Skipið hevur fiskað ógvuliga væl, síðan leirvíkingar keyptu tað, men hetta hevur minni enn so verið nóg mikið til, at raksturin kann bera seg.

# Tungolja er einasta – og seinasta – vónin

**Nú oljan er vorðin so dýr, fer hon avstað við eini 40% av landingarvirðinum - og tað gongur ikki í longdini**

RÆKJUVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið Havborg kemur aftur av Grand Bank, verður lagt um til tungolju, nevniliga ta tyngstu oljuna.

Avtala er gjørd við Skipasmiðjuna á Skála um tað, sum gerast skal og maður, sum starvast hjá verksmiðjuni, ið hevur framleitt maskinuna, hevur lagt teimum, sum skulu gera arbeiði, lag á.

Tungolja er seinasti – og einasti – møguleikin hjá reiðaríinum til tess at bøta um rakstrargrundarlagið, nú oljan fer avstað við eini 40% av landingarvirðinum.

Arbeiðið at leggja um til veruliga tungolju kann gerast fyri ein líkinda pening, tí maskinan er upprunaliga bygd soleiðis, at leggjast kann um til hesa olju.

Við umleggingini, sum helst fer at kosta einar tvær miljónir krónur, er væntandi, at skipið fer at spara eini 40% í oljuútreiðslunum.

### Tungolja vanlig

Flest øll stór skip kring um heimin sigla við tí tyngstu oljuni, eisini russisku skipini, sum vanliga liggja í Nólsoyarfirði.

Tí er tað púra burtur við at halda, at tað verður okkara fiskiskipafloti, sum fer at dálka umhvørvið fyri tann skuld, um nøkur fá skip leggja um til tungolju.

Sum skilst, eru trý sløg av olju; tann vanliga, sum skipini brúka, olja sum er tung, men ikki tyngst og síðan tann tyngsta oljan.

Sosialurin hevur skilt, at tey reiðaríir, sum ætla at byggja maskinurnar um til tunga olju, hugsa meira um ta hálv-tungu oljuna, tí tað er dýrt at byggja maskinurnar um, tá ið tær upprunaliga ikki eru bygdar til umbyggingar.

Maskinan umborð á Havborg er sum nevnt bygd til umbyggingar, og tí arbeiða leirvíkingar við at leggja um til ta tyngstu – og bíligastu – oljuna.